SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Januar, 2012

## SJÓRÆNARAVIRKSEMI – Fyrsta loyvi givið til vápnað vaktarfólk umborð

Síðst í desember varð loyvi givið tveimum føroyskum skipum at seta vápnað vaktarfólk umborð, tá ið leiðin er í vandamiklum sjógvi av Afrikastrondini.

Hetta er fyrstu ferð, at føroyskir myndugleikar hava givið tílíkt loyvi, og er avgerðin tikin eftir langa og gjølliga viðgerð av málinum. Fyri sjóvinnutjóð sum Føroyar, við longum royndum á havinum, er trygdin hjá fólkunum umborð á føroyskum skipum altíð avgerandi spurningurin.

Áhaldandi álopini frá sjórænarum eru ein ógvusligur vandi í altjóða skiparakstrinum, og hevur vaksandi trupulleikin órógvað altjóða myndugleikar almikið. At tílík loyvi verða mett ein óynskt tilgongd kann kortini ikki forða fyri, at føroyskir myndugleikar eru komnir at somu niðurstøðu sum onnur lond, vit bera okkum saman við: T.e. at taka øll fyrilit, sum takast mugu til tess at veita teimum trygd, sum hava sína tænastu umborð á skipum, ið ferðast í vandamikla økinum.

Eins og í teimum báðum umrøddu førunum, fara tó umsóknir at verða viðgjørdar hvør sær. Sjóvinnustýrið er av teirri áskoðan, at avgerð um slíkt loyvi eigur at verða grundað á leiðbeiningar frá IMO, sum eru galdandi til eina og hvørja tíð.

Er tørvur á øðrum upplýsingum um málið, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Sjóvinnustýrið.

--- 00 ---